# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Nýggju hjálparvenjari skal finnast

**John Petersen heldur ikki fram í sessinum sum hjálparvenjari hjá A-landsliðnum í fótbólti. Tað ber illa til at sampakka hetta við starvið sum Formula-venjari og venjaraútbúgvingina**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað verður bara sum venjari hjá Skála, at John Petersen nú fer at virka. Boðini úr FSF eru, at teir vóna, at ein nýggjur hjálparvenjari skjótt verður funnin*

Hóast tað nú er hálvt ár síðani, at Jógvan Martin Olsen longdi venjarasáttmálan við FSF, so er enn ikki greitt, hvussu verður við starvinum sum hjálparvenjari hjá Jógvan Martini.

Slíkir spurningar plaga vanliga at verða greiddir, samstundis sum landsliðsvenjarin setir sína undirskrift á, men tað er so ikki hent í hesum førinum.

## Sampakkar illa

Og tað tykist mest sum púrasta greitt, at tað verður ikki John, sum heldur fram í sessinum.

Orsøkirnar til hetta eru fleiri, greiðir Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, frá.

- Eitt er spurningurin, um tað ber til at vera hjálparvenjari hjá landsliðnum og Formula-venjari samstundis. Tað var eitt mál, sum vit tosaðu um undan seinasta skeiðnum hjá mær sum hjálparvenjari. Og tá var niðurstøðan, at tað bar ikki til.

- Hin parturin av síðuni er so spurningurin um venjaraútbúgvingina. Tá John byrjaði sum hjálparvenjari, fór hann samstundis undir fyrsta partin av venjaraútbúgvingini. Nú er hann so farin í holt við seinasta partin, so hann kann fáa A-lisens sum venjari. Tann útbúgvingin krevur, at tú ert venjari hjá einum liði, so tað bítur seg kanska eitt sindur í halan í so máta, um hjálparvenjarin hjá A-landsliðnum tekur A-útbúgvingina samstundis. Tí sjálvandi vilja vit fegin, at hesin skal taka útbúgving, men tað inniber altso, at hann má standa fyri einum liði.

- Og reint praktiskt er tað eisini trupult at sampakka útbúgvingina og hjálparvenjarasessin. Tað er nevn-liga so, at allar samlingarnar hjá venjarunum eru samstundis, sum landsliðið hevur sínar venjingar. Og tað ber illa til at vera fleiri staðni í senn, sigur Jógvan Martin.

## Loysn er ávegis

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, váttar eisini, at oman fyri nevndu viðurskifti gera, at tað illa ber til hjá John Petersen at halda fram í sessinum sum hjálparvenjari.

Fyrsta uppgávan hjá landsliðnum í ár verður í Íslandi tann 16. mars. Men so leingi kemur spurningurin um hjálparvenjaran vónandi ikki at bíða.

- Eg veit ikki akkurát, nær vit hava eina loysn. Men gongst væl, so verður hetta kanska loyst longu í vikuni, sigur Ísak Mikladal.

Tað kundi so bent á, at FSF longu er í samráðingum við ein komandi hjálparvenjara, men hvørki Jógvan Martin Olsen ella Ísak Mikladal fáast at siga nakað um tann partin av málinum.

# Svimjarar fingið stuðulsavtalu

**Við hátíðarløtu sunnudagin skrivaðu Niels Pauli Eysturberg, formaður í SuSvim, og Martin H. Dam, stjóri í Inntakt, undir stuðulsavtalu**

SVIMJING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Avtalan millim Inntakt og SuSvim hevur við sær, at Pál Joensenog Dánjal Martin Hofgaard kunnu brúka nógva tíð uppá kappingar og veninging uttan fyri landoddaranar. Avtalan ber eisini við sær, at SuSvim fær styrk.



*Frá undirskrivingini av stuðulsavtaluni*
*Mynd; F. Johannessen*

